# Hvussu er støðan hjá føroyska fiskiskipa-flotanum?



*Í nøkur ár hevur grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe, gjørt upp støðuna í fiskiflotanum og hjá fiskavirkjunum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Á hesum báðum síðunum fara vit í stuttum at greiða frá niðurstøðunum hjá grannskoðarafel-agnum, Rasmussen & Weihe, um gongdina í føroyska fiskiskipaflotanum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Grannskoðarafelagið, Rasmussen & Weihe, hava gjørt eina roknskapargreining av føroyska fiskiskipaflotanum fyri árini 2000-2004, har felagið við støði í almennu ársroknskapunum hevur greinað roknskapartølini fyri hesi árini.

Í greiningini yvir fiskiskipaflotan eru – við fáum undantøkum – øll skip tikin við, sum eru omanfyri 110 tons ella hava eina maskinorku, sum er størri enn 400 hk.

Hetta er sambært flokkingini av fiskiskipum í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Aftrat almennu ársroknskapunum hjá teimum feløgum, sum eiga skipini, hevur grannskoðarafelagið eisini fingið uppl‡singar um veiðinøgd, nettosølu og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri heildarmyndina.

Útróðrarflotin er ikki við í greiningini, tí tað eru bert fáir bátar, sum eru skipaðir í partafeløg ella smápartafeløg við skyldu at lata inn almennan ársroknskap.

**Framløga**

Á hvørjum ári seinastu árini hevur felagið skipað fyri framløgu av úrslitunum, sum komið er fram til, fyri viðskiftafólkum.

Á framløgufundinum týsdagin var størsti denturin lagdur á fiskiflotan, men við endan av fundinum varð tikið saman um gongdina hjá fiskavirkjunum.

Greiningin er býtt upp hesar bólkar: 1) Allur flotin, 2) Pelagisk vinna, 3) Rækjuvinna, 4) Verksmiðjutrolarar, 5) Partrolarar, 6) Lemmatrolarar, 7) Línuskip, 8) Garnaskip og 9) Onnur skip.

Partrolarar:

# Glottar eru at hóma, nú fiskaprísurin er batnaður

**Sambært hagtølum hava partrolararnir havt ein vøkstur í veiðinøgd upp á stívliga 26% níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør. Seinastu tíðina eru fiskaprísirnir eisini hækkaðir rímiliga nógv**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað sær betur út hjá partrolaraflotanum, nú fiskaprísirnir seinastu tíðina eru hækkaðir rímiliga nógv, samstundis sum fiskiskapurin er góður. Hinvegin hála høgu oljuprísirnir úrslitið niðureftir*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Partrolaraflotin er enn hampiliga væl fyri, men fíggjarstøðan er versnað munandi seinastu 2-3 árini. Miðalprísurin hevur verið støðugt fallandi síðan ár 2000, men er nú á veg uppeftir aftur.

- Eftir stóru afturgongdina frá 2002 til 2003 merkti afturgongdin frá 2003 til 2004, at samlaða ársúrslitið hjá partrolarunum fyri 2004 gav eitt hall upp á 9,3 miljónir krónur.

Rasmussen & Weihe siga í greiningini, at tær ábendingar, sum felagið hevur fyri árið í ár, eru positivar, hvat veiðinøgd viðvíkur.

- Sambært hagtølunum hjá Føroya Fiskimannafelag hava partrolararnir havt ein vøkstur í veiðinøgd upp á stívliga 26% níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør.

Felagið vísir á, at miðalprísurin hinvegin er lækkaður nakað í hesum tíðarskeiði, men er hækkaður rímiliga nógv aftur seinastu tíðina.

Samlaða veiðivirðið er eisini sambært Føroya Fiskimannafelag økt 16% fyrstu níggju mánaðirnar av 2005 í mun til sama tíðarskeið í fjør.

Rasmussen & Weihe halda tí, at raksturin hjá partrolaraflotanum verður nakað betri – ella á leið tann sami – sum undanfarna ár, tá ið hædd verður tikin fyri høgu oljuprísunum.

Partrolararnir høvdu annars eitt sera gott ár í 2001,og árini 2000 og 2002 royndust eisini væl.

- Úrslitini í 2003 og 2004 eru munandi verri enn øll hini árini orsakað av nógv lægri miðalsøluprísi, sigur felagið.

Miðalaldurinhjápartrolaraflotanum er 25 ár.

---

Lemmatrolarar:

# Fara helst at merkja eina afturgongd

**Fíggjarstøðan hjá lemmatrolarunum er hampilig, men gjaldførið versnaði munandi frá 2001 til 2002 og er ikki nøktandi við árslok 2004**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Miðalprísurin er minkaður við góðum 6% níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár, og samanlagt er veiðivirðið minkað við 14%*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sambært greiningini hjá Rasmussen & Weihe er fíggjarstøðan hjá lemmatrolarunum hampilig, eins og konsolideringin er rímiliga góð.

- Gjaldførið hjá hesum skipabólki versnaði munandi frá 2001 til 2002, og er ikki nøktandi við árslok 2004.

Felagið sigur, at lemmatrolararnir hava megnað at havt ein rímiliga javnan rakstur í árunum 2000 til 2003, men í 2004 hevði hesin skipabólkur munandi afturgongd í rakstrinum í mun til árið fyri.

- Tí gjørdist talan samanlagt um eitt hall í 2004 upp á 7,1 miljónir krónur.

Sambært hagtølum hjá Føroya Fiskimannafelag hevur hesin skipabólkur merkt eina afturgongd í veiðinøgd upp á út við 10% fyrstu níggju mánaðirnar av 2005 í mun til somu tíð árið fyri.

- Haraftrat kemur, at miðalprísurin samstundis er minkaður við góðum 6% í sama tíðarskeiði, og samanlagt er veiðivirðið minkað við 14% í 2005 í mun til somu tíð í 2004.

Rasmussen & Weihe vísa á, at ikki minst hjá hesum skipabólki, sum brúkar lutfalsliga nógva olju, er hesin postur vaksin í 2005, nú oljan er vorðin so d‡r.

- Roknast má tí við, at lemmatrolarar fara at merkja eina afturgongd í rakstrinum í 2005, heldur felagið.

Fíggjarstøðan hjá hesum skipum er hampilig, men gjaldførið versnaði munandi frá 2001 til 2002 og er ikki nøktandi við árslok 2004.

- Ognaravkastið hevur verið skiftandi og er vorðið negativt við árslok 2004. Rentingin av eginogn hevur somuleiðis verið skiftandi fram til 2003 og er negativ í 2004. Sama er við rakstraravkastinum, sigur felagið.

Miðalaldurin hjá lemmatrolarunum er 21 ár.